







# Besta íløga v

Kosmetiskar viðgerðir eru settar á breddan í Føroyum. Fyrr tosaði eingin um slíkt, men í dag er tað púra náttúrligt at fáa skorið eitt stykki av eygnalokunum ella sogið feitt úr bróstunum. Vit hava prátað við fýra kvinnur, sum allar siga, at broytta útsjóndin gav teimum eitt betri lív

Inni í fjálga køkinum í flagtektu húsunum uppi á Vágsheygum í Klaksvík sita fýra flottar, festligar og djarvar kvinnur í besta aldri og fáa sær kaffimunn aftur við livandi práti um undirlutakenslur, útsjónd og kosmetiskar skurðviðgerðir.

Hugnaligu umstøðurnar, har gamlir møblar koma til heiðurs og æru, og hugsað er um hvørja detalju, passa væl til eitt prát um, hvussu ein broytt nøs og minka bróst hava givið nýtt mót og nýggjan lívshug.

51 ára gamla Anna og 46 ára gamla Malan hava báðar fingið viðgerð á nýggju kosmetisku viðgerðarstovuni í Klaksvík, Artharmonia. Anna slapp av við tung eygnalok, og Malan fekk minni bróst. Marianna, 41 ár, fekk bróstimplantat í Íslandi í 2001, men longu sum 14 ára gomul blivu oyruni rættað, meðan 61 ára gamla Ruth fekk nýggja nøs við skurðviðgerð í Bretlandi longu í 1979. Í ár hevur hon eisini minkað eygnalokini.

Allar eru tær á einum máli um, at hetta eru bestu íløgurnar í teirra lívi.

– Hetta eru best nýttu pengar í mínum lívi, sigur Malan, sum fyrr í ár fór frá at brúka skál G til D. Allar hinar nikka samtykkjandi.

Søgan hjá hesum fýra vísir, at talan er um meira enn bara kosmetikk og útsjónd, og samstundis eru tær eisini livandi prógv um, at tøgnin rundan um kosmetiskar skurðviðgerðir er í ferð við at verða brotin í Føroyum.

## Fekk nøs, sum hóskaði

Tá Ruth fekk sína viðgerð í 1979, kendi hon ongan, sum hevði fingið kosmetiska viðgerð, og hon greiðir frá, at tað næstan var av tilvild, at hon fekk tað gjørt.

– Eg var kedd um nøsina, sum heilt einfalt var tvey nummur ov stór, men tað hevði ongantíð komið mær til hugs at spyrja kommunulæknan, um okkurt kundi gerast, greiðir hon frá.

– Tað er faktiskt Rajani'sa æra, at eg fekk tað upp í lag (red: Gordon Rajani, fyrrverandi skurðlækni á Klaksvíkar Sjúkrahúsi). Eg minnist tað, sum var tað í gjár. Tað var norðoyastevna, og Rajani skuldi avheinta okkurt toy fyri konuna, og tá hann kemur inn, hugdi eg knappliga upp á hann, peikaði á nøsina og segði: Veist tú ongan, sum kann orna hetta her?

Tað var skjótt, so vóru myndir sendar til góðan skurðlækna í Bretlandi, og avtala varð gjørd um, at Ruth skuldi koma til skurviðgerð.

– Men eg segði tað ikki fyri einari sál, heldur ikki fyri mammu. Eg visti, at hon fór at geva mær eina moralprædiku, og tað tímdi eg ikki, sigur Ruth.

Bretski skurðlæknin helt avgjørt, at hon átti at fingið sær eina minni nøs, og hann vísti henni eina mappu við filmstjørnum og øðrum vøkrum fólkum.

– Men eg segði við hann, at eg vildi ikki líkjast nøkrum. Eg vildi bara hava eina nøs, sum passaði til andlitið hjá mær.

## Broytt útsjónd, broytt lív

– Eg haldi ikki, at eg var so tilvitað um tað áðrenn, men eftir skurðviðgerðina var tað heilt undarligt, at eg nú kundi venda mær uttan at hugsa um, hvør nú sá nøsina í profil, sigur Ruth.

Eisini Anna fegnast eisini um sínu nýggju eygnalok. Og hon hevði ikki blinkað við at gjørt tað umaftur.

– Skurðviðgerðin hevur gjørt ótrúligan mun. Nú er alt so ljóst, tí ongar gardinur hanga og skugga fyri ljósinum, og tað er heilt undarligt at kunna smyrja mær, uttan at alt hvørvur inn í millum rukkurnar ella uppi á brýrnum, sigur hon smílandi. Og væleydnaða skurðviðgerðin hevur givið henni mót til eisini at fáa innlagt bróstimplantat.

Fyri Maluna, sum fekk sína skurðviðgerð í januar í ár, er lívið vorðið bæði léttari og betri, nú stóra bringan er minkað.

– Eg havi altíð roynt at fjalt meg í myrkum klæðum, og boygt meg saman, tá eg sat, sigur Malan. Tey seinastu trý árini hevur hon eisini gingið regluliga til fysioterapeut, tí ryggur og herðar vóru so slitin.

– Eg eri so ræðuliga glað, at eg fái ikki sett orð á, hvussu stóran týdning skurðviðgerðin hevur havt, sigur hon rørd.

– Í dag kann eg ganga upprætt í ljósum klæðum, og síðani skurðviðgerðina havi eg ongantíð verið til fysioterapeut, greiðir Malan frá.

## Førdi skurðlæknar saman

Marianna sigur tað sama. Hon hevði fullkomiliga mist bringuna eftir at hava givið bróst. Men longu sum 14 ára gomul hevði hon fingið sína fyrstu kosmetisku skurðviðgerð.

– Eg varð illa happað, tí eg hevði so útstandandi oyru, og